# FISKIRANNSÓKNIR

# 2

*Jákup Sverri Joensen*

## FISKIROYNDIR VIÐ TROLI Á SUMRI 1969

*Fiskirannsóknarstovan*

*Tórshavn 1970*

# FISKIRANNSÓKNIR

# 2

*Jákup Sverri Joensen*

## FISKIROYNDIR VIÐ TROLI
## Á SUMRI 1969

*Fiskirannsóknarstovan*

---

*Tórshavn 1970*

*INNIHALD*

Inngangur ........................................ 3
Royndirnar við Núgvunesi og Grunnabarði ... 6
Viðmerkingar ..................................... 17
Upplýsingar frá Føroya Fiskasølu ........... 22

Landsprentsmiðjan — Tórshavn.

## Inngangur

Fyri gott 30 árum síðani var so trároynt undir Føroyum, at talan var um ovfisking av ávísum fiskasløgum sum t. d. av toski. Í bardagaárunum 1940--45 var veiðumagnið (fiskaríintensiteturin) munandi minni enn áður, og fiskastovnurin tók aftur at nørast.

Sum kunnugt vóru tað bretskir trolarar, ið høvdu skuldina fyri tí ovfisking, ið var undan krígnum. Teir veiddu yvir 90% av øllum fiski, ið veiddur varð undir Føroyum. Tilsamans høvdu teir tá einar 250.000 troltímar árliga í miðal her. Aftaná bardagaárini royndu bretskir trolarar av ymiskum orsøkum ikki so nógv undir Føroyum sum undan krígnum. Teir komu ongantíð uppá 250.000 tímar í eitt einstakt ár, og t. d. í árunum 1950—63 royndu teir her í 171.000 troltímar árliga. Síðani fiskimarkið í 1964 var flutt út á 12 fjórðingar, hevur bretska veiðumagnið undir Føroyum verið munandi minni, ella í árunum 1964—68 103.000 troltímar árliga. Seinnu árini hevur veiðan um troltíman verið vaksandi.

Týskir og franskir trolarar royna nú undir Føroyum. Týskarar fóru at royna her av álvara mitt í 1950 árunum, og fransar byrjaðu fyri fáum árum síðani. Bæði týskarar og fransar royna á djúpum vatni, uttan fyri 100 favna dýpi, og fáa teir mest av upsa, men eisini kongafisk. Og hevur fiskiskapur teirra tí ikki stóra ávirkan á fiskastovnin inni á landgrunninum.

Sum kunnugt royna útlendingar at kalla bert við troli undir Føroyum. Tó royna norðmenn og skotar nakað við línu.

Føroyingar hava higartil at kalla bert roynt við húki undir Føroyum. Í 30'unum veiddu vit ógvuliga lítið, so lítið, at okkurt ári var bert 2% av samlaðu fiskiveiðuni her fingin av føroyingum. Undir og eftir bardagan hevur føroyska veiðan harafturímóti verið vaksandi. Tíverri hava vit eingi fullfíggjaði hagtøl yvir veiðuna í árunum 1940—52. Og heldur ikki aftaná, serstakliga ikki seinastu árini eru hagtølini heilt álítandi. Fyrst í 50'unum veiddu vit ímillum 13 og 16% av tí fiski, ið veiddur varð undir Føroyum. Síðani er okkara partur vorðin størri. 1. talva vísir, hvussu stór miðalveiðan var árliga undir Føroyum

1. talva. *Árliga miðalveiðan undir Føroyum 1956—65.*

| | *Øll lond* | *Harav Føroyar* | |
|---|---|---|---|
| | *tons* | *tons* | *%* |
| 1. Toskur | 27.849 | 7.733 | 28 |
| 2. Hýsa | 21.987 | 6.442 | 29 |
| 3. Upsi | 14.892 | 1.079 | 7 |
| 4. Kongafiskur | 4.270 | — | — |
| 5. Longa | 3.712 | 438 | 12 |
| 6. Brosma | 3.390 | 1.439 | 42 |
| 7. Kalvi | 2.098 | 292 | 14 |
| 8. Tunga | 931 | — | — |
| 9. Havtaska | 792 | — | — |
| 10. Hávur | 749 | — | — |
| 11. Skøtir | 527 | — | — |
| 12. Hvítingur | 415 | — | — |
| 13. Reyðsprøka | 283 | — | — |
| 14. Steinbítur | 233 | — | — |
| 15. Sandsprøka | 121 | — | — |
| Øll sløg uttan sild | 83.685 | 17.681 | 21 |

í árunum 1956—65, og hvussu stóran part føroyingar hava veitt. Hesi árini veidu vit 21% av fiskinum, ið veiddur varð undir Føroyum. Tvey tey seinastu árini hevur okkara partur tó verið heldur størri. Tað eru tilsamans 15 fiskasløg, ið veidd verða meira enn 100 tons av árliga. Her er talan um fisk, ið livur á botni, tí er sildin ikki tikin við í hesum føri. Av hesum 15 fiskunum veiða føroyingar bert 6. Spurningurin er tí, um vit ikki eiga at royna eftir fleiri fiskasløgum enn vit gera í løtuni, so at veiða okkara kann verða meira fjølbroytt.

Seinastu 10 árini hevur Fiskirannsóknarstovan gjørt ymiskar trolroyndir undir Føroyum við leigaðum skipi og við m/s Jens Chr. Svabo. Hesar royndir eru gjørdar fyri at kanna fiskastovnin sum heild. Tær hava m. a. víst, at her eru fiskasløg, ið føroyingar eiga at leggja seg eftir at veiða. Vit kunnu t. d. nevna tungu, reyðsprøku og havtasku.

Jens Chr. Svabo hevur á sumri bert trolað í juni, tí hann hevur verið bundin av øðrum arbeiði restina av sumrinum. Av hesum hildu vit, at roynd átti at vera gjørd við leigaðum báti at trola í einar 4 mánaðir á sumri fyri at vita, hvussu nógv veiðast kundi.

## Royndirnar við Núgvunesi og Grunnabarði

Eftir uppskoti frá okkum fingu vit frá landsstýrinum loyvi at leiga 2 bátar til trolroyndir undir Føroyum í tíðarskeiðinum 1. mai—31. august 1969.

Eftir lýsing í bløðunum var avgjørt at leiga Núgvunes av Eiði og Grunnabarð úr Sumba. Núgvunes er 32 tons brutto og hevur 90 hesta motor. Grunnabarð er 46 tons og hevur 220 hk. Av tí at bátarnir vóru ikki lidnir at rigga til, varð Grunnabarð leigaður frá 12. mai og Núgvunes frá 3. juni. Grunnabarð helt uppat 31. august og Núgvunes 2. september.

Á hvørjum báti var ein maður frá Fiskirannsóknarstovuni. Úrslitini frá trolroyndunum hjá Jens Chr. Svabo komu okkum nú tilgóðar, soleiðis at mest varð roynt á teimum leiðum, har Svabo hevði veitt mest.

Bátarnir veiddu tilsamans 509.256 kg av fiski, sum varð avreitt fyri kr. 460.673,81. Tá er prísviðbótin ikki íroknað. Trolið var í botni í 1.669 tímar tilsamans. Miðalveiðan var soleiðis 309 kg um troltíman. 2. og 3. talva vísa yvirlit yvir avreiðingarnar hjá ávikavist Grunnabarði og Núgvunesi.

Á 1. mynd eru vístar leiðirnar, har bátarnir hava roynt. Leiðirnar eru strikaðar, og eru tær merktar við tølunum frá 1 til 12:

## 2. talva. *Landingar »Grunnabarð« 1969* (Vekt í kg)

| *Dato* | *Pláss* | *toskur* | *hýsa* | *upsi* | *longa* | *steinb.* | *havtaska* | *skøta* | *tunga* | *reyðsprøka* | *kalvi* | *íalt kg* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. mai | Vágur ....... | 486 | 86 | | | | | | | | | 572 |
| 21. mai | Klaksvík ... | 6.026 | 864 | | | 195 | 1.297 | 404 | 2.340 | 4.470 | 43 | 15.639 |
| 27. mai | Vágur ....... | 6.387 | 383 | | | 92 | 876 | 300 | 2.108 | 3.854 | 28 | 14.028 |
| 30. mai | Vágur ....... | 3.322 | 587 | 226 | | 66 | 516 | 202 | 1.569 | 914 | | 7.402 |
| 6. juni | Vágur ....... | 15.034 | 4.243 | 896 | 403 | 285 | 1.814 | 119 | 6.055 | 3.682 | 111 | 32.642 |
| 13. juni | Klaksvík ... | 9.634 | 1.867 | 1.173 | 139 | 206 | 992 | | 2.207 | 1.228 | | 17.446 |
| 21. juni | Vágur ....... | 12.095 | 838 | 84 | | 122 | 1.295 | | 3.055 | 1.293 | 48 | 18.830 |
| 27. juni | Vágur ....... | 4.159 | 260 | 47 | | | 1.039 | | 1.787 | 594 | 16 | 7.902 |
| 10. juli | Vágur ....... | 14.189 | 891 | 133 | 229 | 495 | 3.934 | 155 | 6.708 | 1.391 | 115 | 28.240 |
| 18. juli | Tórshavn ... | 15.257 | 1.557 | | | | 3.556 | | 5.915 | 5.546 | | 31.831 |
| 26. juli | Vágur ....... | 7.044 | 1.673 | 107 | | 128 | 1.877 | 23 | 3.213 | 1.265 | 107 | 15.437 |
| 6. august | Vágur ....... | 114 | 728 | | | | | | | 9 | | 851 |
| 11. august | Vágur ....... | 2.377 | 1.344 | | | | 936 | | 978 | 589 | 71 | 6.295 |
| 19. august | Klaksvík ... | 4.713 | 3.218 | | 61 | | 1.999 | 48 | 2.817 | 997 | 83 | 13.936 |
| 1. septemb. | Klaksvík ... | 5.670 | 5.117 | | | | 3.737 | 91 | 4.567 | 1.919 | 61 | 21.162 |
| | Íalt .......... | 106.507 | 23.656 | 2.666 | 832 | 1.589 | 23.868 | 1.342 | 43.319 | 27.751 | 683 | 232.213 |

## 3. talva. *Landingar »Núgvunes« 1969* (Vekt í kg)

| *Dato* | *Pláss* | *toskur* | *hýsa* | *upsi* | *steinb.* | *havtaska* | *skøta* | *tunga* | *reyðsprøka* | *íalt kg* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. juni | Eiði | 10.481 | 1.476 | 585 | | 1.332 | 249 | 3.605 | 4.970 | 22.698 |
| 13. juni | Tórshavn | 5.168 | 450 | 228 | | 658 | | 1.723 | 986 | 9.213 |
| 19. juni | Tórshavn | 10.020 | 127 | | 83 | 785 | | 2.696 | 1.396 | 15.107 |
| 24. juni | Eiði | 13.480 | 315 | | 180 | 1.691 | | 2.975 | 1.144 | 19.785 |
| 28. juni | Eiði | 21.716 | 154 | | 15 | 196 | | 280 | 239 | 22.600 |
| 4. juli | Eiði | 4.091 | 246 | | | 265 | | 595 | 568 | 5.765 |
| 12. juli | Tórshavn | 13.001 | 670 | | | 1.500 | | 2.520 | 2.277 | 19.968 |
| 17. juli | Tórshavn | 15.823 | 2.047 | 60 | | 2.300 | | 3.185 | 2.950 | 26.365 |
| 28. juli | Eiði | 12.463 | 1.952 | | 77 | 1.062 | | 1.610 | 1.076 | 18.240 |
| 31. juli | Eiði | 26.023 | 2.344 | | | 48 | | | 48 | 28.463 |
| 2. august | Eiði | 5.944 | 747 | | | 41 | | | 35 | 6.767 |
| 5. august | Eiði | 17.545 | 1.767 | | | 29 | | | 15 | 19.356 |
| 8. august | Eiði | 1.404 | 581 | | | 283 | | 315 | 126 | 2.709 |
| 13. august | Eiði | 11.537 | 3.132 | | | 3.557 | | 3.080 | 1.694 | 23.000 |
| 18. august | Eiði | 4.486 | 1.945 | | | 402 | 29 | 1.015 | 881 | 8.758 |
| 21. august | Eiði | 2.083 | 1.372 | | | 676 | | 641 | 696 | 5.468 |
| 25. august | Eiði | 159 | 238 | | | | | | | 397 |
| 29. august | Eiði | 3.411 | 3.099 | | | 1.825 | | 1.470 | 1.212 | 11.017 |
| 3. septemb. | Eiði | 6.261 | 2.410 | | | 1.115 | | 945 | 636 | 11.367 |
| | Íalt | 185.096 | 25.072 | 873 | 355 | 17.765 | 278 | 26.655 | 20.949 | 277.043 |




*1.* Á hesi leið eystanfyri Fugloy og Svínoy er góður trolbotnur. Her royndu báðir bátarnir nógv mest — tilsamans í 1.500 troltímar, og er hetta 90% av samlaðu royndini. Mest var roynt á leiðini, sum á kortinum er dupult strikað, uttan fyri 6 fjórðingar úr landi, og er úrslitið víst á 4. talvu. Vit síggja her, hvørji fiskasløg veidd eru, hvussu nógv av hvørjum slag sær og virði av teimum. Tilsamans eru 10 fiskasløg avreidd, men av hesum eru 5 sløg 98% av veiðuni, og eru hesi toskur, hýsa, havtaska, tunga og reyðsprøka. Verður roknað eftir vekt, eru toskur og hýsa 60,4% og tunga, reyðsprøka og havtaska 37,5% av veiðuni. Men

4. talva. *Veiðan hjá Grunnabarði og Núgvunesi eystanfyri Fugloy og Svínoy* (leið 1)

| | *Grunnabarð* *kg* | *Núgvunes* *kg* | *Tilsamans* *kg* | *Vekt* *%* | *Virði* *kr.* | *Virð.* *%* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur ...... | 103.103 | 108.645 | 211.748 | 50,4 | 133.401 | 32,3 |
| Hýsa ......... | 21.685 | 18.884 | 40.569 | 9,7 | 32.295 | 7,8 |
| Upsi ......... | 2.666 | 873 | 3.539 | 0,8 | 1.593 | 0,4 |
| Longa ......... | 832 | — | 832 | 0,2 | 499 | 0,1 |
| Steinbítur ... | 1.569 | 355 | 1.924 | 0,5 | 770 | 0,2 |
| Havtaska ..... | 23.423 | 17.559 | 40.982 | 9,7 | 35.237 | 8,5 |
| Skøta ......... | 1.342 | 278 | 1.620 | 0,4 | 972 | 0,2 |
| Tunga ........ | 42.847 | 26.477 | 69.324 | 16,5 | 121.513 | 29,5 |
| Reyðsprøka .. | 27.567 | 20.714 | 48.281 | 11,5 | 84.501 | 20,5 |
| Kalvi ......... | 683 | — | 683 | 0,2 | 1.366 | 0,3 |
| Íalt ........... | 225.717 | 193.785 | 419.502 | 100 | 412.147 | 100 |

rokna vit eftir virði, er toskur og hýsa bert 40,5%, meðan flundrufiskurin og havtaskan er 58,3%.

Fongurin um troltíman á 1. leið var um 280 kg hjá báðum bátunum (Grunnabarð 284 og Núgvunes 277 kg). 5. og 6. talva vísa, hvussu nógv veitt er um troltíman av ymiskum fiskasløgum fyri hvønn hálvan mánaða. Tað sæst, at Grunnabarð hevur veitt meira av flundrufiski og havtasku enn Núgvunes. Og kemur hetta ivaleyst av, at Grunnabarð, sum hevur munandi størri motororku, brúkti longri breidlar enn Núgvunes. Afturímóti fekk Núgvunes meira av toski enn Grunnabarð. Verður nú hugt eftir, hvussu fiskiskapurin er, ta tíðina ið roynt er, síggja vit, at veiðan av toski var góð í juni—juli, men munandi minni í august. Afturímóti var hýsuveiðan best í august. Tó var hon eisini tá lítil í mun til toskaveiðuna. Av upsa var nakað at fáa fyrrapartin í juni, men lítið og einki bæði áður og aftaná. Fongurin av havtasku var nakað hin sami alla tíðina, úr 20 og upp í

5. talva. *m/b »Grunnabarð« 1969. 1. leið. E. úr Fugloy, kg um troltíman*

| *Dato* | *tímar* | *toskur* | *hýsa* | *upsi* | *longa* | *steinbítur* | *havtaska* | *skøta* | *tunga* | *reyðsprøka* | *kalvi* | *samlað pr. tíma* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15.—31. mai .............. | 105 | 150 | 17 | 2 | | 3 | 26 | 9 | 57 | 88 | 1 | 353 |
| 1.—15. juni .............. | 139 | 177 | 44 | 15 | 4 | 4 | 20 | 1 | 59 | 35 | 1 | 360 |
| 16.—30. juni .............. | 98 | 159 | 10 | 1 | | 1 | 23 | | 47 | 17 | 1 | 259 |
| 1.—15. juli .............. | 161 | 160 | 10 | 1 | 2 | 3 | 37 | 1 | 64 | 34 | 1 | 313 |
| 16.—31. juli .............. | 99 | 108 | 25 | 1 | | 1 | 34 | | 56 | 28 | 1 | 253 |
| 1.—15. august ........... | 36 | 70 | 39 | | | | 27 | | 28 | 17 | 2 | 181 |
| 16.—30. august ........... | 161 | 51 | 45 | | | | 33 | 1 | 45 | 18 | 1 | 194 |
| Íalt ......................... | 799 | 129 | 27 | 3 | 1 | 2 | 30 | 2 | 54 | 35 | 1 | 284 |

6. talva *m/b »Núgvunes« 1969. 1. leið. E. úr Fugloy, kg um troltíman*

| *Dato* | *tímar* | *toskur* | *hýsa* | *upsi* | *steinbítur* | *havtaska* | *skøta* | *tunga* | *reyðsprøka* | *samlað pr. tíma* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3.—15. juni | 97 | 160 | 20 | 8 | | 20 | 3 | 55 | 61 | 327 |
| 16.—30. juni | 110 | 222 | 4 | | 3 | 24 | | 53 | 25 | 330 |
| 1.—15. juli | 141 | 196 | 16 | | | 25 | | 38 | 35 | 311 |
| 16.—31. juli | 63 | 217 | 29 | | 1 | 25 | | 40 | 29 | 341 |
| 1.—15. august | 97 | 133 | 43 | | | 40 | | 38 | 22 | 276 |
| 16.—30. august | 193 | 79 | 43 | | | 20 | | 19 | 16 | 177 |
| Íalt | 701 | 156 | 27 | 1 | 1 | 25 | — | 38 | 30 | 277 |

40 kg um tíman. Nógv var at fáa av tungu serstakliga í mai, juni og juli, men heldur slakari var veiðan í august. Fyrstu tíðina var nógv reyðsprøka at fáa, serstakliga í mai og fyrrapartin av juni. Eisini í juli var væl av reyðsprøku, men í august var minni. Tað er líkt til, at reyðsprøkan stendur ógvuliga nett, tí í summum hálum var óføra nógv, men í øðrum hálum var at kalla einki.

Sum heild má vera sagt, at fiskiskapurin var sera góður á hesi leið alla tíðina, ið roynt var, sjálvt um hann var slakari í august enn fyrru tíðina.

*2.* Til sammetingar vórðu nøkur hál roynd innan fyri 6 fjórðingar úr landi. Annars varð nógv mest roynt uttan fyri 6 fjórðingar.

Á leiðini eystur úr Dalsnípu (5—6 fjórðingar úr landi) er slættur botnur. Her var bert lítil roynd gjørd, eitt einstakt hál við Núgvunesi (7. talva). Fongurin var 140 kg av toski, 35 kg av hýsu og 18 kg av havtasku.

*3.* Vestan fyri Suðuroy er sera góður trolbotnur á 70—74 favna dýpi frá leiðini vestur úr Akrabergstanga allan vegin norður eftir til leiðina vestur úr Nýpubakka.

Grunnabarð hevði nøkur hál á sunnara parti av hesi leið (8. talva og 1. mynd). Hann fekk 220 kg um troltíman, serstakliga av toski og hýsu. Minni var til av havtasku, tungu og reyðsprøku. Annars roynir Jens Chr. Svabo her einar 2 ferðir um árið, og hevur tá ofta verið væl at fáa.

*4.* Innan Skeiva banka, ímillum bankan og landgrunnin vestanfyri Suðuroynna, er mórubotnur. Heldur ójavnur er botnurin, men av tí at bleytt er, er her gott at trola. Bert eitt hál varð roynt, og lítið var í, eitt sindur av hýsu. Við Jens Chr. Svabo hevur viðhvørt fingist væl frá hesi leið og suður eftir, serstakliga av toski og havtasku — og hvítingsbróðir, tá tættur posi hevur verið undir.

7. talva. *m/b »Núgvunes« 1969. Kg um troltíman*

| *Leið* | *tímar* | *toskur* | *hýsa* | *upsi* | *steinbítur* | *havtaska* | *skøta* | *tunga* | *reyðsprøka* | *íalt* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 E. úr Fugloy | 701 | 156 | 27 | 1 | 1 | 25 | | 38 | 30 | 277 |
| 2 E. úr Dalsnípu | 2 | 80 | 20 | | | 10 | | | | 110 |
| 5-6 Mýlingsgrunnur | 9 | 62 | 52 | | | 8 | | 8 | 4 | 134 |
| 7 Út fyri Saksun | 2 | 258 | 32 | | | | | | | 290 |
| 8 Botnaleiti | 110 | 638 | 44 | | | 1 | | | 1 | 685 |
| 9 N. úr Rivtanga | 6 | 307 | 92 | | | | | 5 | | 404 |
| 10 N. úr Enniberg | 7 | 142 | | | | | | 11 | | 152 |
| 11 Djúpini | 3 | 37 | 62 | | | | | | | 99 |
| 12 Viðvík | 3 | 431 | | | | | | | 33 | 464 |
| Íalt | 843 | 220 | 30 | 1 | | 21 | | 32 | 25 | 329 |

8. talva. *m/b »Grunnabarð« 1969. Kg um troltíman*

| *Leið* | *tímar* | *tosk* | *hýsa* | *upsi* | *longa* | *steinbítur* | *havtaska* | *skøta* | *tunga* | *reyðsprøka* | *kalvi* | *íalt* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 E. úr Fugloy ............ | 799 | 129 | 27 | 3 | 1 | 2 | 30 | 2 | 54 | 35 | 1 | 284 |
| 3 V. fyri Suðuroy ......... | 21 | 98 | 88 | | | | 19 | | 11 | 4 | | 220 |
| 4 Innan Skeivabanka .... | 1 | 10 | 50 | | | | | | | | | 60 |
| 7 V. fyri Saksun .......... | 4 | 299 | 53 | | | | 8 | | 56 | 23 | | 439 |
| Íalt ........................... | 825 | 130 | 29 | 3 | 1 | 2 | 29 | 2 | 53 | 34 | 1 | 283 |

*5.* og *6.* Norður úr Mykinesi og vestur og í útnorðing úr Mýlingi er víð leið við hampuliga góðum trolbotni. Roynt er 9—14 og 5—6 fjórðingar úr landi. Veiðan var 134 kg um troltíman, mest toskur og hýsa, men ikki sørt av flundrufiski og havtasku (7. talva).

*7.* Undir Vestmanna- og Saksunabjørgunum er mest reinur sandbotnur. Her høvdu báðir bátarnir stutta roynd, bert 6 troltímar tilsamans. Og var her nógvur toskur at fáa. Ivaleyst var hann innkomin eftir nebbasildini, sum toskurin var fullur av. Fitt av hýsu var eisini at fáa, og umframt fekk Grunnabarð væl av tungu og reyðsprøku (7. og 8. talva). Hann royndi heldur ytri og norðari enn Núgvunes.

*8.* Leiðina ímillum Eiðiskoll og Ritunøv rópa eiðismenn Botnaleitið, og gjóarmenn rópa hana Vesturi á Sandi. Á hesi leið royndi Núgvunes í tveimum umførum, nevniliga seinast í juni og um mánaðarskifti juli—august. Veiðan var ófør, tilsamans 685 kg um troltíman, harav 638 kg var toskur. Restin var at kalla øll hýsa. Einstakar havtaskur og reyðsprøkur (7. talva).

Toskurin, ið veiddur varð á sandgrynnuni her, var sildafiskur, stóð og fylti seg av nebbasild.

*9.* Norður úr Rivtanga vórðu einstøk hál tikin. Her var eisini nógv at fáa, 404 kg um troltíman, mest toskur, men eisini væl av hýsu og eitt sindur av tungu (7. talva).

*10.* Eisini norður úr Ennibergi vórðu nøkur hál roynd. Fongurin var 152 kg um troltíman, alt toskur uttan 11 kg av tungu (7. talva).

*11.* 2 hál vórðu tikin í Djúpunum fram við Kalsoynni. Her var lítið at fáa, 99 kg um troltíman, hýsa og toskur.

*12.* Inni á Viðvík varð eisini roynt. Her er reinur sandbotnur. Og vísti tað seg at vera nógvur sildafiskur her. Tilsamans var veitt 464 kg um troltíman, harav 431 kg var toskur og 33 kg reyðsprøka (7. talva).

## Viðmerkingar

Verður hugsað um fiskastovnin undir Føroyum, er tað sjálvandi umráðandi, at vit fáa so nógv burtur úr hesum stovni sum møguligt, ella at vit veiða so nógv, sum stovnurin sum heild tolir — og heldur ikki meira. Hetta rópa menn eina optimala veiðu.

Vit kunnu ikki einsamallir gera av, hvussu veitt verður á øllum landgrunninum undir Føroyum. Bert á landleiðini ráða vit sjálvir og kunnu m. a. gera av, hvør fiskireiðskapur skal vera loyvdur her. Tó mugu vit ansa eftir, at tær reglur um meskavídd og minstamát o. t., ið ásettar eru í konventiónini fyri landnorðingspartin av Atlantshavinum, vera hildnar.

Sum kunnugt varð landleiðin munandi økt í 1964, tá fiskimarkið var sett til 12 fjórðingar. Á landleiðini er ikki loyvt at veiða við troli. Her verður tí at kalla bert roynt við húki. Halda vit fram við hesum, verður helst ongantíð talan um eina optimala veiðu. Summi fiskasløg sum t. d. toskur, hýsa, brosma og kalvi kunnu kanska veiðast optimalt við línu. Men so eru onnur fiskasløg, sum at kalla als ikki kunnu veiðast við húki. Teir mest virðismiklu av hesum eru tunga, reyðsprøka og havtaska.

Hetta, at bert nakrir av gagnfiskunum verða veiddir, sum nú á landleiðini hjá okkum, fer helst at gera og hevur longu ført við sær, at teir fiskar, ið verða ikki veiddir,

nørast nógv. Tunga og reyðsprøka liva partvís av somu botndýrum sum hýsa. Tí kann ein siga sær sjálvum, at tað verður ikki heldugt fyri hýsuna, um vit fáa eina ovskipan av hesum báðum flundrufiskum. Havtaskan er sera slúkin fiskur. Í maganum á henni finna vit stóra hýsu, tosk, tungu og aðrar gagnfiskar. So tað er ikki lítið, hon tekur av fiski um árið. Tí man tað ikki vera gott fyri stovnin av gagnfiskum, um havtaskan nørist ov nógv.

Væl er til av tungu undir Føroyum, og nørd er hon, síðani fiskimarkið varð flutt út. Hon verður veidd av bretskum trolarum, og fingu teir í árunum 1954—63 1.005 tons í miðal um árið. Men eftir útflytanina av fiskimarkinum veiða teir munandi minni. Í árunum 1964—68 var miðalveiða teirra bert 472 tons árliga. Og kemur hetta av, at meginparturin av tunguni er at finna innan fyri fiskimarkið serstakliga á sumri. Her verður hon ikki veidd, og tí er stovnurin munandi vaksin tey seinastu 5 árini. Eisini er tungan vorðin størri seinnu árini. Í 1961 vístu kanningar, at hon var 30 cm í miðal, meðan hon í 1969 var 36 cm.

Nakað av reyðsprøku er undir Føroyum. Bretskir trolarar veiða um 300 tons um árið, heldur meira seinastu árini. Stovnurin er vaksandi, tí hon verður ikki veidd á landleiðini. Reyðsprøkan er víðgongdari enn tungan, tí ger nøringin á landleiðini tað, at veiðast kann meira eisini uttanfyri sjómarkið. Eisini reyðsprøkan er vorðin størri seinnu árini. Í 1961 var hon 45 cm í miðal og í 1969 53 cm.

Nógv er til av havtasku á okkara leiðum. Undan 1964 veiddu útlendskir trolarar um 800 tons árliga, men aftaná útflytanina av sjómarkinum er veiðan minkað niður í 500 tons árliga. Og kemur hetta av, at stórur partur av havtaskuni er á landleiðini. Tað framgongur eisini skilliga av royndartrolingini við Jens Chr. Svabo, at stovnurin er vaksin munandi seinastu árini.

Trolroyndirnar við Jens Chr. Svabo seinnu árini og við Núgvunesi og Grunnabarði í 1969 vísa, at nógvur fiskur

kann veiðast á landleiðini við troli á sumri. Sum nevnt royndu Núgvunes og Grunnabarð nógv mest uttan fyri 6 fjórðingar úr landi.

Tá roynt varð innan fyri 6 fjórðingar, varð mest roynt á sandgrynnum, har nógvur sildafiskur stóð. Tað er royndur lutur, at hesin fiskur, ið stendur stappaður av nebbasild, tekur ikki væl húk, serstakliga ikki á línu. T. d. kann nevnast, at seinast í juli 1969 frættist av Eiði, at bátarnir vóru rímdir av Botnaleiti vegna fiskaloysi. Fyri at kanna hetta tók Núgvunes nøkur hál við troli á hesi leið, og har var óføra nógv til av toski. Hann tók bara ikki — hvørki línu ella snøri (snellu).

Eftir uppfatan okkara verður ov lítið veitt av hesum fiski, ið stendur so høgliga á sumri. Tá hann hevur etið seg stóran og feitan her, rímur stórur partur av honum út um sjómarkið, har hann verður veiddur av útlendskum trolarum. Á sandgrynnunum eigur hann at verða veiddur við øðrum tíðarhóskandi reiðskapi. Av ymiskum grundum kunnu vit tó ikki mæla til, at loyvi verður givið at brúka trol so nær landi, sjálvt um nógvur fiskur kann veiðast við troli her.

Øðrvísi er, tá vit koma út um 6 fjórðingar úr landi. Sum kunnugt er mesti útróðurin á sumri við opnum báti. Og man tað ikki vera ov nógv sagt, at meginpartin av veiðuni fáa hesir bátar innan fyri 6 fjórðingar. Sum sagt royndu Núgvunes og Grunnabarð nógv mest á leiðini eystur úr Fugloy og Svínoy. At kalla øll henda leið er uttan fyri 6 fjórðingar. Á stórum parti av hesi leið er bleytur botnur (lúsabotnur), og verður lína sjáldan sett her. Her eiga bátar at kunna royna við troli uttan at nerva nakran útróður. Eftir okkara hugsan nýtist trolveiða við nøkrum smáum bátum uttan fyri 6 fjórðingar ikki at tarna línuveiðuna á sumri. Tað er sjálvandi ikki ætlan okkara, at línu- og snørisveiðan skal halda uppat. Fyri flakavirkini hevði tað havt stóran týdning, um nakrir bátar royndu við troli á sumri. Sum dømi um hetta kann nevnast, at flaka-

virkið á Eiði var afturlatið vegna fiskaloysi frá juli til september 1968. Men í 1969 var tað í gongd alla tíðina. Og kom hetta fyrst og fremst av, at Núgvunes, sum royndi við troli, avreiddi her.

Fara vit ikki at veiða tungu, reyðsprøku og havtasku á landleiðini, mugu vit samanbera hesar virðismiklu fiskar við illgras, ið kappast um føðina við tey fiskasløg, vit veiða. Fara vit afturímóti at veiða teir, fáa vit tvey fyri eitt. Tunga, reyðsprøka og havtaska gevur nógvan pening og nógv arbeiði, og samstundis gerst tað liviligari hjá toski, hýsu og øðrum fiski.

Mongum føroyingi dámar ikki trolið. Og er hetta væl skiljandi, tá hugsað verður um, hvussu trároynt her hevur verið av útlendskum trolarum. Men tey løttu nylontrolini við plastikbobbins og løttum lemmum, sum smærri bátar nú brúka, kunnu als ikki samanberast við tær tungu greiðirnar við jarnbobbins og stórum, tungum lemmum, sum stóru trolararnir hava brúkt higartil.

Raksturin av einum trolbáti er munandi bíligari enn raksturin av einum línubáti av somu stødd. Og kemur hetta fyrst og fremst av, at útreiðslurnar til línu og agn eru so stórar. Eisini krevur línuveiðan størri manning enn trolingin. Í hesum viðfangi verður eisini víst til upplýsingar frá Føroya Fiskasølu á bls. 22.

Við tíðarhóskandi, skynsomum reiðskapi mugu vit royna at fáa eina optimala veiðu av flest øllum gagnfiskum. Sum er verður roynt eftir ov fáum fiskasløgum, og vit veiða ov lítlan part av tí samlaðu veiðinøgd, ið veidd verður undir Føroyum. Vit eiga tí, eisini á landleiðini, fyri uttan línu og snøri at brúka annan reiðskap, ið fangar fleiri fiskasløg, sum ikki taka húk. Eisini eiga vit at kappast við útlendingar um veiðuna undir Føroyum.

Vit eru av tí áskoðan, at loyvi eigur at verða givið nøkrum fáum bátum (t. d. 6—8) undir eftirliti at brúka trol á landleiðini inn ímóti 6 fjórðingum úr landi einar

3—4 mánaðir á sumri. Bátastøddin eigur at vera avmarkað (t. d. undir 50 tons brutto).

Tær reglur fyri minstamát fyri fisk og fyri meskavídd ið galdandi eru fyri Føroyar skulu sjálvandi haldast. Umframt eigur minstamát at vera ásett fyri kalva, ið veiddur verður við troli.

At døma eftir veiðuúrslitunum hjá Núgvunesi og Grunnabarði, vildi tað ikki verið neyðugt við nakrari prísviðbót til hesa veiðu. Tvørtur ímóti átti tað at verði umhugsa at leggja á eitt avgjald, ið skuldi farið í ein grunn til fiskiroyndir, tí slíkan grunn hava vit harðliga fyri neyðini.

## Upplýsingar frá Føroya Fiskasølu

I Føroyum eru 17 flakavirkir við einari samlaðari frystiorku upp á 475 tons. Í 1968 hava virkini framleitt 4.500 tons av flaki til útflutnings. Og svarar hetta til 12.900 tons av ráfiski.

Heilt fá virkir eru so framkomin, at akordir verða nýttar. Hetta er ein beinleiðis fylgja av óstabilum tilflutningi av rávøru, serstakliga á sumri. Ein onnur orsøk er ókunnleiki hjá virkisleiðarum til meting av arbeiðinum á teim ymisku økjum á virkinum, og vita teir lítið um tílíka arbeiðsgongd í øðrum londum.

Um tann neyðuga rávørunøgdin á einum vælskipaðum virki skuldi verði viðgjørd á rættan hátt, var tað eisini ein treyt, at formaður og hjálparmenn hansara høvdu fullan kunnleika til arbeiðsgongdina og ikki minst fatan av tí, ið kravdist av keyparum.

Við tí verandi frystiorku vildi ein rávørunøgd upp á knapt 900 tons verið neyðug bert fyri at halda hjólini gangandi í ein 8 tímars arbeiðsdag. Út frá hesum kann ein so rokna, hvussu nógv kom burtur úr við 2 hold skiftir, ella t. d. 10 tímars dag.

Fíggjarligi týdningurin av kontinuerligum tilflutningi av rávøru er eyðsæddur. Eitt virki, ið viðger fisk á vælskipaðan og rationellan hátt, har arbeitt verður dag um dag, fær eisini eitt lið av fólki, hvørs úrtøka animerar sama fólki

til at møta dag um dag, og herav kemur ein óavvitandi rationalitetur í gongd.

Ein rationellur fiskiskapur er tó ein treyt fyri fiskatilflutningi, ið føða kann virkið.

Teir, heldur enn ikki, órationellu hættir til at skaffa rávevni til flakavirkini kunnu sigast at vera:

Línuveiðan: 1. Við stórari manning.
2. Við kostnaðarmiklum línum.
3. Við kostnaðarmiklum agni.
4. Við óøkonomiskari egning.

Snørisveiðan: Ov smáar nøgdir av toski og hýsu, burtursæð frá upsa (á vári og sumri).

Línu- og snørisveiðan geva ongan flundrufisk uttan kalva og svartkalva.

Tá vetrar- og várfiskiskapurin er av, fara tey stóru línuskipini á saltfiskaveiðu á fjarleiðum. Tá verður eitt deytt tíðarskeið, har flakavirkini fáa ov lítla rávøru.

Á virkjunum ganga fastløntir menn og taka ímóti smáum nøgdum av fiski frá smábátum, og hesin fiskur kann avgjørt ikki viðgerast á rationellan hátt, tí tað kostar at fáa hjólini at mala, og síðan at reinska eftir nøkrum hundrað pundum av fiski.

Tað nervar virkið sera nógv, at í hesi tíð kann manningin frá vetrartíðini ikki steðga dag eftir dag eftir arbeiði. Hon noyðist at fara til annað arbeiði ella út av landinum. Nú skal nýtt fólk til, tá arbeiði byrjar aftur, og her kemur aftur tað órationella fram.

Troling er meira rationellur veiðuháttur. Møguleikar finnast fyri at rationalisera troldrift. Sum dømi um hetta kann nevnast, at norskir trolarar inntil fyri stuttum hava verið mannaðir við 21—23 monnum, sum hava fingið í teirra part 36% av søluni. Í dag verða somu trolarar mannaðir við 12—13 monnum og føra í land eina vøru, sum í prísi er 20% lægri enn áður, meðan manningin fær eina løn, sum er 15% hægri.

Tað hevði verið av avgerandi týdningi fyri flakavirkini, um loyvið varð givið til troling, serstakliga á sumri, tá ov lítið er at gera á virkjunum. Hin virðismikli flundrufiskurin hevði givið nógv arbeiði.

Fyri at vit kunnu fylgja við í útbyggingini og søluni av okkara fiskavørum, er tað av avgerandi týdningi, at vit rationalisera bæði fiskiskap og produktión. Trolveiða eftir flundrufiski og øðrum fiskasløgum kann frígera okkum fyri prísviðbótina, ið er ein koddi, sum vit helst mugu sleppa av við, tí landið eigur heldur at styðja tiltøk, ið miða ímóti rationellum, lønandi fiskiskapi.